## Reingerðarfólk

Søkt verður eftir tveimum reingerðarfólkum til Høllina á Hálsi, Badmintonhøllina, Hoyvíkshøllina og Fimi.

Talan er um eitt fulltíðarstarv og eitt hálvtíðarstarv.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir við reingerð. Góð samstarvsevni eru eisini ein fyritreyt.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn verður at senda til Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 21. juni 2010.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Dánjal Samuelsen, hallarleiðari, á telefon 521475.

**Onnur størv í Tórshavnar Kommuna – Lesið meira á www.torshavn.fo**

**Pedagogar** – Dagstovnurin á Landavegnum
Umsóknarfreist 21.06.2010

**Pedagogar** – Býlingshúsið inni á Gøtu
Umsóknarfreist 21.06.2010

**Hjálparfólk og køksfólk** – Býlingshúsið á Ternuryggi
Umsóknarfreist 21.06.2010

**Pedagogar og hjálparfólk** – Býlingshúsið í Maritugøtu
Umsóknarfreist 21.06.2010

**Lønar- og setanarviðurskifti** fyri pedagogstørv eru í samsvari við galdandi sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## KUNNGERÐ

### Broyting av veganøvnum

Tað verður við hesum gjørt kunnugt, at býráðið á fundi 28. apríl 2010 samtykti:

at gøtan til tey bæði húsini á matr. nr. 105 og 106 í Kollafirði fær navnið **Húsagøta,** at navnið Frammi í Dali í Kollafirði verður broytt til **Frammi í Dal,** at nýggi sambindingarvegurin í Hoyvík verður nevndur **Klingran,** og at vegastubbin við vinnubygningin á matr. nr. 51b á Velbastað fær navnið **Uppi á Heiðum.**

Á fundi 20. mai 2010 samtykti býráðið, at gøtan Grímsoyarvegur verður broytt til **Mattalágarvegur,** og at gøtunavnið Mattalág verður strikað, og adressan Mattalág 1 kemur upp í Jóannesar Paturssonar gøtu.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# SKEIÐ Í MATVØRUREINFØRI

***Skeið fyri fólki, sum ætla at veita mat til ferðafólk í egnum heimi - heimablídni***

**Tíð og stað:** Skeiðið verður mikudagin 16. juni 2010 á Húsarhaldsskúla Føroya frá kl. 9-15
**Prísur:** 500 kr, íroknað mat og tilfar
**Undirvísarar:** Joan M. Joensen og Jóhanna á Tjaldrafløtti

**Undirvíst verður um:**

- ***Bakteriur***
- ***Reinføri í samband við matvørur***
- ***Reinføri í samband við amboð***
- ***Persónligt reinføri***



**Tilmelding** á www.husarhaldsskulin.fo
í seinasta lagi fríggjadagin 11. juni.

*Vegleiðing til heimablídni sambært Heilsufrøðiligu starvsstovuni*

*Skeiði er í samstarv við VisitFaroeIslands*

Húsarhaldsskúli Føroya I Stoksoyrarvegur 29 I 700 Klaksvík
Tel. 456974 I hsf@olivant.fo I www.husarhaldsskulin.fo

**Valdemar Lützen Byggibúð**
**Skálatrøð 14**
**Postboks 20**
**110 Tórshavn**
**T-postur: vlb@vlb.fo**



**Ein fyritøka í stórari framgongd**
Valdemar Lützen Byggibúð er ein amboðshandil sum eisini hevur Ruko-lásatænastu um alt landið. Vit selja m.a. amboð, fiskireiðskap, besløg, havareiðskap, el-artiklar, lím og fugu, hurðahondtøk, harafturat hava vit eitt stórt úrval av rustfríðum vørum og nógv annað. Vit liggja í hjartanum í Havn, á Skálatrøð, "Har sólin og sjógvurin møtast".

# Vit leita eftir tí rætta, at koma í handilslæru hjá okkum

**Tú sleppur at:**
- Avgreiða kundar í amboðshandli okkara
- Gera alt sum hoyrir til handilsyrki
- Fáa upplæring innan lásatænastu

**Vit ynskja at tú:**
- Møtir væl upp til ásettu tíð
- Ert fyrikomandi og álítandi
- Ert nærløgd/lagdur
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Ikki ert bangin fyri at arbeiða
- Dámar at fáa avbjóðingar

Tú fær løn samb. S&K.

**Um tú hevur:**
- HH, er lærutíðin 2 ár.
- FHS, er lærutíðin 3 ár.
- Student, HF ella HT, er lærutíðin 2½ ár. (í 2½ ára lærutíðini skalt tú taka ávísar merkantilar lærugreinar.)

Um hettar hevur tín áhuga, send okkum so eina umsókn saman við prógvum og møguligum viðmælum.

Umsóknarfreist: 13. juni 2010

Hevur tú spurningar, er tú vælkomin at ringja til Høgna Lützen tlf. 301020 ella 213536.

Valdemar Lützen Byggibúð

